Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins:

Løgmaður eigur at royna ABC

–Tað er løgið av løgmanni at vilja royna ACDE, tá hesin møguleikin er troyttur og miseydnaðist. Royndin at fáa eina ABCD samgongu var bara hálvhjartað. Eg haldi tí, at løgmaður skyldar Sambandsflokkinum at gera tær samráðingarnar lidnar, serstakliga tá flokkurin vil flyta seg langt á sjálvstýrisleið

Løgmaður eigur at royna ABC-samgongu, heldur Jóannis Eidesgaard, formaður í Javnaðarflokkinum

SAMGONGU-MØGULEIKAR
Jan Müller

–Vit hava als ikki fríar samráðingar um skipan av landsstýri. Vit uppliva, at eitt ávíst politiskt bakland nú er averandi fyri, hvørjir samgongumøguleikar skulu roynast. Hetta minnir ikki sørt um eina einflokkaskipan, tí nú er tað bara Fólkaflokkurin, sum definerar, hvat er ein brúkilig samgonga og ikki sigur Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins, eftir at løgmaður hevur tosað við sítt bakland og gjørt sær eina niðurstøðuur frá tí. Henda niðurstøða er m.a. at royna at fáa eina samgongu millum ACDE.

Jóannes Eidesgaard sigur, at hóast man hevur sitið í fýra dagar og viðgjørt samgongumøguleika millum ACDE, og har samráðingarnar slitnaðu uppá nøkur rættiliga prinsipiell mál við yvirtókupolitikkinum, sigur løgmaður nú, at hann vil royna tað einaferð aftrat, tí tað er tað hansara bakland heldur.

-Tað er eitt sindur fremmant fyri meg, at tað er bara ein flokkur, um situr við definitiónini av sannleikanum og av eini skilagóðari samgongu. Tað er mær vitandi ein skipan, sum vit gjørdu upp við í 80-unum.

Jóannes Eidesgaard viðgongur, at løgmaður situr inni við einum mandati og initiativi sambart Stýrisskipanini, og tað má man virða. Men hann heldur, at hetta er við at fara um markið, har tolið hjá hinum flokkunum og veljarunum er uppi.

-Løgmaður hevur sagt allmænt, at hansara uppgáva er at seta Fólkaflokkin so væl sum møguligt í eini samráðingarstøðu, og tað má tí sigast, at Anfinnur Kallsberg fult út hevur megnað leiklutin sum løgmaður fyri Fólkaflokkin einsamallan og ikki fyri ta politisku skipanina. Tí meti eg eisini, at hann er farin út um tað, sum liggur í Stýrisskipanini, og tí fáa vit onga rímilighein innan fyri skipanina, fyrr enn hann fer í tingið og biðjur um eina formansrundu. Tað haldi eg hann skuldi gjørt.

Einki hoyrt

Formaður Javnaðarfloksins hevur enn einki hoyrt frá løgmanni men fer sjálvandi at møta á fundi, tá hann fær fundarboð. Tó heldur hann tað vera løgið, at løgmaður nú skal raðfesta ACDE fremst, tá hesin møguleikin nettupp hevur verið royndur í fýra samfull samdøgur. Skal tann møguleikin bera til, so skal Tjóðveldisflokkurin dragna nógv. Javnaðarflokkurin er longu farin út um tað mark, sum flokkurin kann standa modell til, uttan at vit tó hava havt okkara bakland inni.

Jóannes Eidesgaard heldur eisini, at løgmaður hevur ein trupulleika mótvegis Sambandsflokkinum. Hann hevur kallað inn til eitt samráðingarumfar millum Sambandsflokkin og Javnaðarflokkin, men sum hann ongantíð royndi. Henda royndur var bara hálvhjartað, gekk eina nátt og steðgaði so. Hon var so heldur ikki uppafturtikin.

Jóannes Eidesgaard heldur ikki, at løgmaður hevði orsøk til at gevast við Sambandinum. Tað, sum var eitt stríðsmál fyrr á kvøldi sá út til at loysna um náttina, nevniliga býti av málsøkjum.

-Eg haldi løgmaður skyldaði okkum, at hann gjørdi ta royndina meira heilhjartaða.

Sambandið flutt seg

Formaður Javnaðarfloksins heldur sjálvur, at nógvir javnaðarveljarar ynskja eina samgongu saman við Sambandinum og Fólkaflokkinum. –Vit hava sað, at Sambandið hevur havt eina politiska endurføðing meira enn nakar annar flokkur við tað, at teir eru sinnaðir til at gera nakrar rættiligar stórar yvirtøkur, eitt nú av fólkakirkjuni. Tað er ikki tann sambandsflokkur vit kendu fyri bara fýra árum síðani. Tí haldi eg eisini, at tað avgjørt liggja møguleikar í tí samgonguni.

-Men leiðslan og baklandið í Fólkaflokkinum hava so meldað nakað annað út?

-Tað skilji eg, og sjálvandi eru vit tilreiðar at fara til tær samráðingar vit verða bidnir um, men eg haldi, at tann møguleikin er longu royndur og skal hann eydnast, so má eg endurtaka, at onkurn má slaka heilt nógv. Og eg ivist í, um Javnaðarflokkurin kann ganga við til meira, enn hann longu er gingin við til.

-Men løgmaður sigur, at tað skulu bara gerast nakrar orðingar, sum báðir partar kunnu semjast um!

-Tað fáa vit at síggja. Eitt er hvat stendur í einum samgonguskjali, annað er hvat tú reint politiskt kann semjast um.

Jóannes Eidesgaard sigur, at man hómar ein broyting í Fólkaflokkinum eftir, at varamenninir eru komnir á ting?

-Eg haldi meg eisini hoyra á løgmanni, at man ikki ynskir Sambandið uppí. Tað haldi eg er løgið, tí hann hevur fingið at vita frá Sambandsflokkinum, at hann vil ganga við til yvirtøkur.

-Løgmaður sigur, at hann kann ikki ganga við til, at Sambandsflokkurin skal innlima okkum inn aftur í ríkið!

-Tað er ein undanførsla. Tí hann veit, at bæði Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin kunnu liva við Heimastýrislógini í fýra ár aftrat, ikki minst tá Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin kunnu liva við henni til í hvussu er 2012.

Formaður Javnaðarfloksins vil ikki útiloka nakran samgongumøguleika men heldur, at løgmaður hevur fingið ein trupulleika, tá hann nú rør aftur á tað, sum hann hevur roynt og ikki roynir tað hann ikki hevur roynt.

Fundur um lesitrupulleikar

Kunnað verður um virksemið og ætlanir, sum Felagið fyri lesi- og skrivitrupulleikar hevur í umbúna

FUNDUR
Turið Kjølbro

Í morgin fríggjadagin verður fundur í MBF-Húsinum kl. 19. Tað er Felagið fyri lesi- og skrivitrupulleikar, sum skipar fyri fundinum. Endamálið við fundinum er at greiða frá virkseminum í felagnum, kunna um, hvørjar ætlanir felagið hevur og hvat verður á skránni í ár. Ásla Prior, sum upprunaliga er útbúgvin sjúkrasystir, heldur fyrilestur. Hon viðger børn við lesi- og skrivitrupulleikum.

Síðani stovnan fyri einum ári síðani hevur Felagið fyri lesi- og skrivitrupulleikar stríðst við at fáa at sett á stovn kvøldskúla til vaksin við lesi- og skrivitrupulleikum. Mentamálastýrið hevur gingið umbønini á møti og hevur játtað Tórshavnar Kvøldskúla at fara undir slíkt skeið.

– Hetta er eitt stórt framstig. Umframt hevur felagið í umbúna at skipa fyri regluligum lesiskeiðum á Oyrarbakka fyri børn í øllum aldri, sum hava lesi- og skrivitrupulleikar. Enn er lærari ikki fingin til vega til skeiðini, sigur Anne-Karin Kjeld, forkvinna í Felagnum fyri lesi- og skrivitrupulleikar.

Felagið vónar góða undirtøku til fundin fríggjakvøldið, sum eisini hevur kaffi og prát á skránni. Øll eru vælkomin.

Eini 30 fólk eru virkin í felagnum, og felagið hevur tætt samband við serfroðingar so sum sálarfroðing, serlærarar, lærarar, og pedagogar.

Játtaði ein part av ákærunum

36 ára gamli danin, sum er ákærdur í størsta rúsevnismálinum í Føroyum nakrantíð, hevur játtað ein part av ákærunum. Hann er ákærdur fyri at hava smuglað og selt 26 kilo av hassji, 43 gramm av amfetamini og 145 gramm av kokaini, og løgreglan hevur savnað ein hóp av prógvum við avlurtingum og avhoyringum

RÚSEVNI
Stefan í Skorini

Føroya Rættur er farin undir at viðgera størsta rúsevnismál í Føroya søgu. Ein 36 ára gamal dani, sum er føddur í Brasilia, er á ákæru-beinkinum. Hann vil bara játta ein lítlan part av teimum ákærunum móti honum. Hann játtar at hava selt og keypt millum 3,7 og 4,6 kilo av hassji, 67 til 80 kilo av kokaini og umleið 30 kilo av amfetamini.

Heilar 33 ákærur eru í ritinum. 32 teirra eru fyri lógarbrot viðvíkjandi rúsevnum. Tann seinasta ákæran er, at maðurin skal hava hótt ein av sínum seljarum við at brenna húsini hjá móðir hansara.

Løgreglan og ákæruvaldið hava savnað ein hóp av prógvum, og fimm dagar eru settir av til hetta rættarmálið. Fullar hillar við skrivligum próvtilfari standa í rættarhølunum, og útgerð til at lurta eftir upptøkum eru eisini sett upp í C. Pløyens gøtu.

Løgregan hevur havt mannin í kikaranum leingi, og hon hevur tikið nógvar telefonsamrøður uppá band. Eisini er avlurting farin fram í heiminum hjá manninum, og løgreglan hevur eisini avlurta mannin, meðan hann hevur sitið varðhaldsfongslaður.

Afturlatnar hurðar

Verjin hjá tí ákærda, Christian Andreasen, vildi hava rættarmálið fyri afturlatnum hurðum. Harafturat vildi hann hava navnaforboð og forboð móti at endurgeva nakað frá rættarfundinum. Orsøkin var, at um vitnini fingu upplýsingar um rættarmálið í fjølmiðlunum kunnu tey leggja sínar frágreiðingar til rættis frammanundan. Hetta tók dómarin ikki til eftirtektar, og alt fer fram fyri opnum hurðum.

Eingi vitni vórðu innkallað tann fyrsta dagin, tí tá fekk tann ákærdi møguleikan at svara fyri tey 33 punktini í ákæruritinum. Seytjan mans eru nevndir í ákæruritinum, og fleiri teirra eru longu dømdir.

Ákæruvaldið krevur fongsulsrevsing, og at hald verður lagt á 1,45 milliónir krónur, sum maðurin hevur forvunnið við rúsevnasølu.

Vikuskifti í Danmark
Prísur fyri hvønn
Føroyar-Keypmannahavn aftur og fram 1.815,-
Føroyar-Billund aftur og fram 1.853,-
(Ferðaavgjøld eru iroknað prísin)
Tað eru serligar reglur galdandi fyri hesar prísir. Tvey fólk skulu ferðast saman og ferðaseðlarnir skulu keypast 7 dagar áðrenn fráferð. Ferðaseðlarnir kunnu keypast til 9. juni 2002, og seinasti heimferðardagur er 17. juni 2002. Talið á hesum ferðaseðlum er avmarkað.
Set teg í samband við eina ferðaskrivstovu ella far inn á www.maersk-air.dk
MAERSK AIR
It's got to be perfect